**Mentamálastýrið**
*Fólkaskúladeildin*

# Lærarastørv í fólkaskúlanum

Í fólkaskúlanum eru niðanfyri nevndu lærarastørv leys at søkja til setanar **1. august 2002.**

**Norðoya skúladømi I:** Klaksvíkar, Hvannasunds, Viðareiðis og Kunoyar kommunur:
Klaksvíkar kommuna:
*Skúlin á Ziskatrøð* 3 lærarar

Viðareiðis kommuna: 2 lærarar

Kunoyar kommuna:
*Kunoyar skúli* 1 einalærari
*Haraldssunds skúli* 1 einalærari

**Norðoya skúladømi II:** Mikladals og Húsa kommunur
Mikladals kommuna: 1 einalærari

**Fugloyar kommuna:** 1 útoyggjalærari

**Eysturoyar skúladømi I:** Fuglafjarðar, Gøtu og Leirvíkar kommunur
Fuglafjarðar kommuna: 2 lærarar
Gøtu kommuna: 1 lærari

**Eysturoyar skúladømi II:** Skála, Sjóvar, Oyndarfjarðar, Runavíkar og Nes kommunur
Runavíkar kommuna: 4 lærarar

**Eysturoyar skúladømi III:** Eiðis, Gjáar, Sunda, Funnings og Elduvíkar kommunur
Eiðis kommuna 1 lærari

**Streymoyar skúladømi I:** Vestmanna og Kvívíkar kommunur
Vestmanna kommuna: 3 lærarar

**Streymoyar skúladømi II:** Hósvíkar, Hvalvíkar og Haldórsvíkar kommunur
Haldórsvíkar kommuna:
*Tjørnuvíkar skúli* 1 einalærari

Streymoyar skúladømi III: Tórshavnar, Nólsoyar og Kirkjubøar kommunur
Tórshavnar kommuna:
*Kommunuskúlin* 5 lærarar
*Eysturskúlin* 7 lærarar
*Venjingarskúlin* 1 lærari
*Hoyvíkar skúli* 1 lærari
*Argja skúli* 5 lærarar

Kirkjubøar kommuna: 1 lærari

**Vága skúladømi:** Miðvágs-Sandavágs, Sørvágs og Bíggjar kommunur
Miðvágs-Sandavágs kommunur: 1 lærari
Sørvágs kommuna: 1 lærari

**Sandoyar skúladømi:** Húsavíkar, Sands, Skálavíkar og Skopunar kommunur
*Sandoyar Meginskúli* 1 lærari

Øll størvini eru roknað við fullum tímatali.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er undir Mentamálastýrinum, Fólkaskúladeildini, við starvsstaði í nevnda skúladømi og við fyribils tænastu í nevnda skúla/nevndu skúlum.

Skylduga undirvísingartímatalið verður ásett eftir galdandi reglum.

Størvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, sum settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

***Umsóknir***
Umsókn, sum verður skrivað á oyðublað, ið fæst frá Mentamálastýrinum, skal verða send **Mentamálastýrinum, Hoyvíksvegur 72, postrúm 3279, 110 Tórshavn,** skjótast til ber og soleiðis, at hon er Mentamálastýrinum í hendi **í seinasta lagi mikudagin 1. mai 2002**. Við umsóknini eiga at verða løgd ljóstøk av prógvbrævi og møguligum viðmælum.

Teir umsøkjarar, ið søkja størv í fleiri kommunum, mega skriva eina umsókn til hvørt starv, ið søkt verður.

Tórshavn, 15. apríl 2002

Mentamálastýrið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279 – 110 Tórshavn
Telefon 355050 – Fax 355055 – e-postur: MMS@MMS.fo

***Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*

# Tímalærarar til Fiskivinnuskúlan

Søkt verður eftir tímalærarum at byrja á Fiskivinnuskúlanum 1. august 2002 í hesum lærugreinum:

**Støddfrøði D (4 t/v)**
**Týskt C (4 t/v)**
**Enskt C og B (8 t/v)**
**Virkisbúskapur B (6 t/v)**
**Matvøruframleiðslutøkni B (4 t/v) og**
**Matvørulæra A (6 t/v)**

Umsøkjarar til støddfrøði á D-stigi skulu hava hóskandi útbúgving t.d. prógv frá læraraskúla. Til hægru stigini skulu umsøkjarar hava prógv frá lærdum háskúla e.l., sum gevur førleika at undirvísa í lærugreinunum. Umsøkjarar við vinnuroyndum hava fyrimun.

Tímarnir verða løntir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara um lærarar á Fiskivinnuskúlanum.

Umsókn skal skrivast á serligt umsóknarblað, sum fæst á Fiskivinnuskúlanum ella frá Mentamálastýrinum. Meira fæst at vita við at venda sær til skúlastjóran á Fiskivinnuskúlanum.

Umsóknir við ljósprentum av próvskjølum o.ø. skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 3. mai 2002.

**Fiskivinnuskúlin**
Postrúm 96
350 Vestmanna – tlf. 424 573
Teldupostur: fiskvest@fiskvest.fo

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Blandimeistari til asfaltverkið í Hundsarabotni

Við tað at ov fáir umsøkjarar vóru, verður við hesum søkt av nýggjum eftir blandimeistara til Hundsarabotn.

Arbeiðið fevnir um at framleiða asfalt við plc-stýrdari útgerð og viðlíkahald av verkinum.

Umsøkjari við í minsta lagi útbúgving sum maskinsmiður, elektrikari ella líknandi hevur fyrimun.

Løn og setanartreytir annars verða sambært avvarðandi sáttmála.

Skrivlig umsókn verður at senda Landsverkfrøðinginum, postboks 78, 110 Tórshavn, innan 25. apríl 2002.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jólsvein Joensen, verkfr. á tlf. 311333/223050 ella formannin í Hundsarabotni, Friðjón Jacobsen, á tlf. 421049.

**LANDSVERKFRØÐINGURIN**



# Fjarðahús

- frá dreymi til veruleika



Vestmanna Timburhandil · tel 472 000 · fax 472 001 · vt@vt.fo · www.vt.fo

REPRO-Z 319540

## søkir eftir avloysarum til Pylsuvognin á Vaglinum

Gerandisdagar ella vikuskiftir.

Møguleiki er fyri at hava skiftandi arbeiðstíð, og eisini frídagar.

Pylsuvognurin hevur opið allar dagar í vikuni, frá 17.00 til 00.30

**Førleikakrøv:**
- Áhuga og royndir í at arbeiða innan sama ella líknandi økið
- Ert álítandi, fyrikomandi og sjálvstøðugur

Umsóknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 23. apríl og skulu sendast til:

**Sjálvsognarstovnin ALV**
Boks 301
110 Tórshavn

# Starvslýsing

Í samband við, at Fuglafjarðar Mentanarhús alment verður tikið í nýtslu 8. juni, verður hervið lýst eftir dagligum leiðara til húsið og kokki at reka matstovuna sjálvstøðugt.

Meira fæst at vita við at venda sær til Sjónleikarafelagið.

Umsóknir skulu vera felagnum í hendi innan 1. mai 2002.

Við mentanarkvøðu

**Fuglafjarðar Sjónleikarafelag**
Postsmoga 14
530 Fuglafjørður
tlf. 214951 ella 211180

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Til sølu

VOLVO F12 6x2 trekkjari, árg. 1/84
VOLVO F10 6x2 við fastari last og HIAB 190 krana
SCANIA P82 6x2 við fastari last v/ gardinum, árg. 4/84
VOLVO F12 8x2 við weirheis, árg. 1/85
10 stk. 20 fót bingjur

**P/F Heri Thomsen**
FO–510 Gøta
tlf. 441047 ella 211047

# Ársaðalfundur

Kristiligt Lurtara- og Hyggjarafelag hevur ársaðalfund Kristi himmalsferðardag, 09. mai 2002 kl. 15.00 í kirkjuni í Gøtu.

**Fundarskrá:**
1) Ársfrágreiðing
2) Ársroknskapur
3) Val av nevndarlimum
4) Val av tiltakslimi
5) Val av grannskoðara
6) Ymiskt

Uppskot, sum limir ynskja at koma til viðgerðar á aðalfundi, og uppskot til nevndarlimir mugu vera formanninum, Una Næs, 530 Fuglafjørður, í hendi 8 dagar frammanundan aðalfundinum.

Í samband við aðalfundin verður eisini alment møti í kirkjuni kl. 18.00.

**Nevndin**

# Deksbátur til sølu

MB Svananes FD160 14,68 tons.

Maskina: 270 hk Volvo Penta Turbo.

Øll nautisk tól og fiskiútstýr er við. Báturin er úr eik og hevur sentralhita umborð. Báturin hevur fiskiloyvi.

**Tlf. 213456**




# Avloysari fyri húsavørðin í Løgtinginum

Í sambandi við, at verandi húsavørður hevur fingið farloyvi í eitt ár, verður søkt eftir avloysara frá 1. juli 2002 at rokna.

Tann, ið settur verður, skal hava handverkaraútbúgving antin sum timburmaður ella snikkari. Somuleiðis skal viðkomandi hava bil, sum skal verða til taks í arbeiðnum.

Lønin er samsvarandi lønini millum Fíggjarmálastýrið og Havnar Handverkarafelag. Harumframt verður latin viðbót kr. 700,– fyri at brúka egnan bil í arbeiðsørindum og ein viðbót, sum er kr. 1.300,– um mánaðin fyri at verða til taks uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Viðbótin fyri bilin er ikki skattskyldug.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Súsonnu Danielsen, stjóra, ella Frank Müller, húsavørð, á tlf. 311000.

Umsóknir saman við avritum av sveinabrævi og møguligum ummælum skulu vera Løgtinginum, Erling Jallsgøta 6, Postrúm 208, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 6. mai 2002, kl. 16.00.

**Løgtingið – umsitingin**